FRÓÐSKAPARSETUR
FØROYA

**Leiðslufundur 2. februar 2016**

| | |
|---|---|
| Heiti: | Leiðslufundur |
| Til staðar á fundinum vóru:<br><br>Frá kl. 10 | Sigurð í Jákupsstovu (SíJ), Malan Marnersdóttir (MM), Hans Pauli Joensen (HPS) og Jørgen Meitilberg (JM)<br><br>Hugin Skaalum (HS), og Elin B. Heinesen (EBH) |
| Skrivað hevur: | JM |
| Fundartíð: | týsdagur, 2. februar 2016 |
| Fundarstað: | SSS |

**Mál til støðutakan:**

**Mál til umrøðu:**

- **Professarafyrilestur hjá Jógvani í Lon Jacobsen**

  Jógvan í Lon er fluttur fram til professara. Fyrilesturin verður fríggjadagin 5. februar kl. 14 í Loftsstovuni á Føroyamálsdeildini. Tiltakið verður lýst í Kringvarpinum.

- **Játtanin fyri 2016**
  Játtanin fyri 2016 varð gjøgnumgingin.

- **Uppskot til løgtingslóg um stuðul til tíðindamiðlar**
  Mentmálaráðið hevur sent Fróðskaparsetrinum uppskot til løgtingslóg um stuðul til tíðindamiðlar til hoyringar. Freistin at gera viðmerkingar er 5. februar 2016 kl. 12.00. Viðmerkingarnar verða orðaðar og sendar MMR skjótast gjørligt.

- **Val av lestrarráðum á SFD og NVD**
  Avgerð er tikin um at skipa lestrarráð á SFD og NVD. Valnevnd verður sett alt fyri eitt, soleiðis at valið verður skipað skjótast gjørligt

- **Kvota 2 upptøka**
  Semja var um, at til upptøkuna 2016 kunnu upp til 30% takast upp í kvotu 2. Tað er upp til deildirnar at meta um, hvussu stóran part tey ynskja at taka.

- **Útbúgvingarprofilur í hjánámi í støddfrøði og føroyskum**
  Tá útbúgvingarprofilarnir eru klárir, verða teir sendir Mentamálaráðnum til góðkenningar.

FRÓÐSKAPARSETUR
FØROYA

**EBH**
Kunnað varð um miðnámsskúlakunningina í sambandi við upptøkuna 2016. Í dag verður farið til Klaksvíkar at marknaðarføra útbúgvingar, sum verða bodnar út í 2016.

Skipað verður fyri skeiði í Office 365 fyri lesandi og starvsfólkum á Setrinum.

**Kunningarmál:**

**Ymiskt:**